# Alt kollapsaði hjá VÍF

FM-FINALA
Terji Nielsen
terji@sosialurin.fo

Royndi vongspælarin hjá vestmenningum, Harald Bjørgvin, hevur upplivað nógv, síðani hann í 1989 á fyrsta sinni royndi seg á besta liðnum hjá vestmenningum, men ein slíkan dyst sum finaluna leygardagin, hevði hann ongantíð áður verið úti fyri.

– Eg veit ikki, hvat tað er, sum hendir. Her kollapsaði alt hjá okkum, og eg havi ongantíð áður verið úti fyri slíkum. Vit hava ein heilan hálvleik at vinna dystin í, tí vit eru bara aftan fyri við tveimum málum í steðginum, men tað riggaði einki. Vit byrja 2. hálvleik í yvirtal, men ístaðin skora teir. Høvdu vit skorað fyrsta málið í 2. hálvleiki, var bara eitt mál á muni, greiddi Harald Bjørgvin frá eftir dystin.

### Spæligleðin á muni

Sjálvur helt Harald Bjørgvin, at tað var ein týðuligur munur á liðunum báðum í finaluni leygardagin.

– Størsti munurin á liðunum í dag var spæligleðin. Teir vóru nógv glaðari fyri at spæla hondbólt enn vit í dag, og tí er tað eisini fult uppiborið, at teir vinna í dag. Eg haldi eisini, at tað er stuttligt hjá teimum, nú felagið fyllir runt, og eg vil ynskja teimum hjartaliga tilukku við FM-heitinum, segði Harald Bjørgvin.

Hann helt eisini, at tá ið spælið koyrir hjá Kyndli, soleiðis sum tað gjørdi leygardagin, so er einki at gera hjá mótstøðuliðnum.

- Vit royndu at koma aftur í aftur, men alt riggaði hjá teimum, og allir mans hjá teimum raka dagin, og tí gjørdist munurin so stórur, segði Harald Bjørgvin at enda.



*Harald Bjørgvin hevur spælt á besta liðnum hjá VÍF síðani 1989, og hann hevur ongantíð áður verið úti fyri at tapa so stórt móti Kyndli í einum avgerandi dysti.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# – Eitt hóskandi farvæl



*Hannis Wardum við stóra FM-steypinum í favninum, eftir at hann hevði eitt gjørt eitt ógvuliga óvæntað come-back á besta liðnum hjá Kyndli í FM-finaluni.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

FM-FINALA
Terji Nielsen
Terji@sosialurin.fo

Ein stórur partur av teimum gott og væl 800 áskoðarunum í høllini á Hálsi leygardagin gløddu við, tá ið tey sóu, hvørjir leikarar hitaðu upp fyri Kyndil undan FM-finaluni leygardagin. Millum menninar í Kyndlahópinum var Hannis Wardum, sum ikki hevur spælt á besta mansliðnum hjá Kyndli í fleiri ár. Hannis slapp eisini á vøllin, tá ið eini tíggju minuttir vóru eftir at spæla, og hann slapp eisini at skjóta eitt brotskast, sum hann sendi í netið.

### Ætlaði at blíva meistari í ár

Hannis Wardum hevur annars verið venjari hjá hoyvíkingum størsta partin av kappingarárinum, men hann bleiv sagdur úr starvi, tá ið trý umfør vóru eftir av endaspælinum.

– Eg segði, áðrenn kappingarárið byrjaði, at eg ætlaði mær at gerast meistari, men eg segði ikki við hvørjum felag, segði Hannis skemtandi eftir dystin leygardagin.

Spurdur, um hann var eitt slag av einum jokara, ið Kyndil hevði gravað fram til finalundystin, segði Hannis Wardum.

– Orðið jokari ella trumfur hevur ongantíð verið brúkt. Eg havi spælt við ávíkavist 3. deild og næstbesta liðnum í alt ár. Tá ið eg gavst á besta liðnum, var tað ein skaði, ið steðgaði mær. Tí fekk ongantíð sagt eitt ordiligt farvæl, og í dag var so eitt hóskandi høvi at gera tað. Tað var nakað heilt serligt at verða við í dag og stuttligt at vinna, men hetta var definitivt seinasti dysturin, segði Hannis Wardum við stóra steypinum í favninum.

# – Allir spæla optimalt

FM-FINALA
Terji Nielsen
terji@sosialurin.fo

Ein av teimum spælarunum hjá Kyndli, ið gekk á odda, tá ið føroyameistararnir "knekkaðu" VÍF í byrjanini av seinna hálvleiki í FM-finaluni leygardagin, var málverjin Johan Danielsen, sum stóð ein rimmar seinna hálvleik. Hann var ikki sørt ovfarin av stórsigrinum.

### Besti dystur á árinum

– Hetta eigur ikki at bera til. Teir eru sjálvandi uppsettir, tá ið teir fara til hálvleiks, tí tá eru bara tvey mál á muni, og ivaleyst ætla teir sær eisini at koma fram um okkum beinan vegin í seinna hálvleiki, men vit økja ístaðin, og tá "knekka teir", segði Johan eftir dystin.

Johan Danielsen helt eftir dystin, at finalan ivaleyst var besti dystur á árinum hjá Kyndli.

– Í dag raka allir mans hjá okkum dagin, og allir spæla optimalt. Tað var líkamikið, um vit skiftu út, tí allir sum koma inn geva 100 prosent, og tí viknar liðið ongantíð. Vit hava nógvar góðar ungar spælarar, og tað er kanska ein av mununum á liðunum báðum, at vit hava ein breiðari hóp enn VÍF, segði Johan Danielsen.

At Johan sjálvur hevði staðið so væl í málinum í seinna hálvleiki, hevði hann ikki so nógvar viðmerkingar til.

– Tað gekk væl, men tað er fyrst og fremst, tí man er so uppsettur, og tí at verjan stóð ómetaliga væl framman fyri mær, segði Johan Danielsen at enda.



*Málverjin Johan Danielsen var ein av leikarunum, ið gekk á odda, tá ið Kyndil tók pippið frá VÍF í byrjanini av seinna hálvleiki í FM-finaluni á Hálsi leygardagin.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*